# Vænta nógv av Londonrutuni




*Starvsfólkið hjá Atlantsflogi er væl nøgt við nýggja búmerkið á flogfarinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Á 13 ára degnum hjá Atlantsflogi, fekk føroyska flogfelagið nýtt búmerki. Nýggja búmerkið ímyndar eina súlu á flogi. Samstundis boðar stjórin frá, at hann væntar, at London fer at verða eitt av teimum størru ferðamálunum hjá føroyska flogfelagnum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Á flogvøllinum: Í samband við avdúkingina av nýggja búmerkinum hjá Atlantsflogi boðaði Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi frá, at hann hevur stórar vónir til nýggju Londonrutuna.

Atlantsflog hevur fingið nýtt búmerki, sum ímyndar eina súlu á flogi. Búmerkið ber samstundis føroysku litirnar.

Umframt at semja var um, at nýggja merkið er vakrari enn tað gamla, hevur tað eisini tað í sær, at tað er framdrift í tí. Súlan er á flogi, og hon flýgur alla tíðina frameftir. Líka mikið, hvørjumegin velið á flogfarinum hon sæst.

Í røðu síni á samkomuni í hangarinum á flogvøllinum, tá nýggja búmerkið varð avdúka,ð segði Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, soleiðis um symbolikkin í búmerkinum:

»Súlan er ein há- og breiðveingjaður fuglur við góðum flogi. Hon er tann størsti sjófuglurin í Norðurhøvum og trívist væl í luftini. Eisini dugir hon sera væl at laga seg eftir veðurlagi og ættum. Ein fuglur við tílíkum eginleikum hóskar væl til búmerkið hjá okkum sum flogfelag.«

Tað er reklamufelagið Sansir, sum hevur gjørt nýggja búmerkið, og Sjúrður Højgaard hevur teknað.

## London

Á tíðindafundi í samband við avdúkingina av nýggja búmerkinum, legði Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi nýggju ferðaætlanina fram.

Har sæst millum annað, at flogið verður tvær ferðir fleiri um vikuna til Keypmannahavnar í summar enn í gomlu ferðaætlanini. Ferðirnar til Jyllands verða tær somu í tali, sum í fjør. Tó nú verður bara flogið til Billund og ikki til Tirstrup/Århus, sum fyrr.

Men tann største broytingin fer at verða Londonflúgvingin, metir stjórin í Atlantsflogi.

Í summar verður flogið eina ferð um vikuna, leygarkvøld, til Stanstead floghavnina í London.

Men London er stórur býur við nógvum fólki og tilboðum. Og eisini føroyingar leita tann vegin. Fleiri eru, sum lesa har á leiðini, og væntandi fer handilssambandið eisini at vaksa, metir Magni Arge. Hann heldur, at um eini trý-fýra ár, fer Londonrutan at verða næststørsta ferðasambandið hjá Atlantsflogi. Høvuðsrutan fer tó tá sum nú at verða Kastrup.

## Aðrar broytingar

Um nýggju hósdagsfráferðirna til Kastrup í summar, segði Magni Arge, at hon fer at liggja seint á kvøldi. Flogið verður úr Vágum klokkan 20.30 og komið til Kastrup klokkan 23.45 danska tíð.

Tað kann tykjast í so seint, viðgongur hann, men leggur dent á, at tað avgjørt eisini hevur fyrimunir við sær. Eitt nú, at fólk, sum eru til arbeiðis í Føroyum, hava møguleika fyri at arbeiða allan hósdagin og so fara avstað um kvøldið uttan at missa ein arbeiðsdag. Eisini fer at bera til at fáa vikuskiftisferðaseðlar til ta fráferðina, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi.

Eisini fráferðirnar fyrrapart fara at liggja eitt sindur seinni enn nú, sigur stjórin.

Fráferðin úr Vágum verður í framtíðini løgd til kl. 11.45. Tað kemst millum annað av, at eitt nú suðringar hava verið misnøgdir við, at tað hevur verið so tepurt við sambandinum hjá Smyrli, at teir hava verið noyddir at farið úr Suðuroy dagin fyri, flúgvast skuldi.

Nú hevur Atlantsflog so flutt fráferðina fram, soleiðis at suðringar eisini sleppa við flogfarinum sama dag, sum tey fara heiman.

Og eisini Aberdeenrutan verður útbygd. Hetta er í stóran mun gjørt í samband við oljuvinnuna, sum væntandi fer at taka seg upp, nú farið verður undir oljuleitingar undir Føroyum í summar.

Eisini tyrluflúgvingin verður munnadi meira, tá farið veðrur at leita eftir olju, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi.




*Á 13 ára føðingardegnum hjá Atlantsflogi fekk flogfelagið nýtt búmerki, sum varð málað á flogfarið*

*Mynd: Edvard Joensen*

gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

# VR Bilar – við Volvo maskinum til arbeiðstakarar

**Síðan VR-Bilar við Hoyvíksvegin herfyri fóru í gongd við sølu og tænastu av Volvo og Renault bilum, er sølan vaksin munandi, samstundis sum teir gera eitt stórt arbeiði við at marknaðarføra sínar vørur. Umframt Volvo persónbilar, lastbilar og bussar, er nú ætlanin at gera meira við ta stóru vøruskránna av entreprenørmaskinum hjá Volvo**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*VR Bilar við Hoyvíksvegin fara nú at gera meira við ta stóru vøruskránna av entreprenørmaskinum hjá Volvo. Á myndini er ein Volvo EC 35, ið er ein 3,5 tons veltimaskina*

*Mynd: Jens K. Vang*

Volvo, ið er ein av størstu ídnaðarfyritøkun í Norðurlondum, varð stovnað tíðliga í 20. øld, sum dótturfelag hjá SKF (Svenska Kullager Fabrikken) við høvuðssæti í Gøteborg. Týdningarmesta framleiðslan hjá Volvo eru persónbilar, lastbilar, bussar, motorar til bátar og skip, eins og entreprenørmaskinur til ídnaðin og landbúnaðin. Volvo Construction Equipment Group er í dag ein av heimsins leiðandi framleiðarum av gravimaskinum, dumparum og veghøvlum.

## Stór vøruskrá

Nógvir møguleikar eru innan Volvo vøruskránna, sum til dømis smáir og stórir lessarar frá 3 til 33 tons, gravimaskinur frá 1,4 til 46 tons, dumparar við 2 ella 3 akslum, frá 20 til 40 tons, eins og veghøvlar í ymiskum støddum. Maskinurnar fáast við allari hugsandi útgerð til flest øll endamál, sum til dømis feiðimaskinur, kavaplógv o.s.v. Vøruskráin ið er sera breið og dekkandi, ger at tað er lætt at fáa sær tað røttu maskinuna til tað endamálið hon skal brúkast til.

## Útvega fígging

Stjórin á fyritøkuni, Sverri Steintún, sigur, at teir útvega kappingarføra fígging frá Volvo Finans, og eru altíð tilreiðar við einum góðum tilboði. Umframt at hava góða eykalutatænastu, fáa teir ein væl útgjørdan hjálparbil, sum hevur alla neyðuga útgerð til at veita bráfeingis hjálp til teirra sum hava lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur, sum ikki fáa arbeitt, tí teir eru uppsteðgaðir ella hava annan bráðfeingis tørv. Hesin bilur kemur at dekka alt meginøki.




*Volvo hevur eina stóra vøruskrá av gravimaskinum og dumparum*

## Nýggjur Corolla á netinum



FDM limablaðið, Motor, almannakunngerð myndir ið eru á internetinum, av einum nýggjum Toyota Corolla sum kemur á evropeiska markanaðin um eitt ár.

*Kelda: FDM / Motor*

## Bilar í Bilka

BILKA

Nú ES hevur ætlanir um at avtaka einkarrættin hjá bilainnflytarunum, kannar stjórin í Dansk Supermarked, Hans Nielsen, ið hevur eina fortíð innan bilavinnugreinina, um Bilka lágpríshandlarnir eisini kunnu selja bilar.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Premacy við metanol



Mazda hevur gjørt heimsins fyrsta hópframleidda brennikyknu bil. Í Mazda Premacy FC-EV verður metanol brúkt til at gera brint og streym til drívmegina í bilinum.

*Kelda: FDM / Motor*